# Duld dagsskrá hóttir sjúklingar og sjúkrarøkt í sjúkrahúsverkinum

VÁR Í GONG

Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar



**Við vælsignilsi frá landsstýrismanni sínum hevur Heilsumálaráðið gjørt eitt liðugt uppskot til bygnaðarbroytingar, sum nú skulu setast í verk í sjúkrahúsverkinum, uttan at taka teir partar, sum hetta umfatar, við upp á ráð. Broytingarnar hótta sjúkrarøktina til allar føroyingar. Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar ávarar ímóti hesi dagsskrá og er til reiðar at taka øll neyðug stig**

Heilsumálaráðið og landsstýrismaðurin í heilsumálum hava í umbúna at trýsta ein nýggjan bygnað oman yvir sjúkrahúsverkið og avmarka starvið sum sjúkrarøktarstjóri til bert at vera eitt eiti. Harvið viknar sjúkrarøktin í sjúkrahúsverkinum, ið allir føroyingar hava rætt til og rinda fyri.

Tað er niðurstøðan av einum fundið millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og landsstýrismannin í heilsumálum, Hans Paula Strøm. Fundurin varð hildin í gjár, mikudagin 25. mars.

*Vár í Gong, formaður í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, sigur:*

- Hvørki Heilsumálaráðið ella landsstýrismaðurin skulu ivast í, at felagið tekur hetta mál í allar størsta álvara. Undir ongum umstøðum góðtekur felagið hesa ætlan, ið vit onga ávirkan hava havt á. Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar er til reiðar at taka øll neyðug stig.

**Bygnaðarbroytingar við slagsíðu**

Seinastu mánaðirnar hevur Heilsumálaráðið arbeitt sera skjótt við bygnaðarbroytingum fyri Landssjúkrahúsið og alt sjúkrahúsverkið. Umframt landsstýrismannin hava bert ávísir persónar í sjúkrahúsleiðslu og Heilsumálaráðnum havt kunnleika til innihaldið í broytingunum.

Starvið sum sjúkrarøktarstjóri hevur – tilvitað – verið ómannað hesa tíðina. Tí var vandi fyri, at júst sjúkrarøktin fór at verða við skerdan lut í arbeiðnum.

*Vandin varð staðfestur á fundinum í gjár:*

bygnaðarbroytingarnar hava álvarsliga slagsíðu, tí sjúkrarøkt verður niðurprioriterað, og starvið sum sjúkrarøktarstjóri gerst bert eitt eiti.

**Duld dagsskrá**

Landsstýrismaðurin talaði á fundinum nógv um, at sjúkrarøktarligi parturin sjálvandi skal prioriterast, og røktarfakkunnleikin skal hava ávirkan. Veruleikin var, at ein stórt sæð púra liðug ætlan um bygnaðarbroytingar varð løgd á borðið.

"Hesin arbeiðsháttur er óhoyrt óseriøsur. Ein liðugtgjørd ætlan verður framløgd. Úrslitið av hesum arbeiðshátti er eitt stórt afturstig fyri sjúkrarøkt og harvið fyri føroyska sjúklingin, ið eigur at vera í miðdeplinum hjá sjúkrahúsverkinum", sigur Vár í Gong, formaður.

**Útvatnað starv sum sjúkrarøktarstjóri**

Partur av ætlanini hjá Heilsumálaráðnum og landsstýrismanninum er, at starvið sum sjúkrarøktarstjóri skal ikki lýsast leyst, so sum almenni setanarpolitikkurin annars krevur.

Í staðin skal ein navngivin persónur í sjúkrahúsverkinum setast í starvið og hava tað afturat sínum verandi starvi.

"Soleiðis verður starvið sum sjúkrarøktarstjóri undirgrivið, og forðað verður fyri, at onnur fólk við góðum førleikum kunnu søkja. Hesa mannagongd fara vit undir ongum umstøðum at góðtaka", sigur Vár í Gong.

Hon leggur stóran dent á, at Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar er sera opið yvir fyri bygnaðarbroytingum, nýskipan og nýskapan í sjúkrahúsverkinum. Treytin er tó, at spælt verður við opnum kortum, og at fakkunnleikin innan sjúkrarøkt fær tað vekt og ávirkan, atlitið til sjúklingin krevur.

**Øll álitisfólk kallað inn**

Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar kallar í dag álitisfólk á øllum trimum sjúkrahúsum til fund í Havn fríggjadagin kl 9.30.

"Øll sjúkrarøkt á øllum sjúkrahúsunum verður rakt av ætlanini, um hon verður sett í verk. Eg kann ikki undirstika nóg týðiliga, at felagið er til reiðar at taka øll neyðug stig", sigur Vár í Gong, formaður í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

# Gamli løgmansflokkurin í politiskum tómrúmi

MAGNI LAKSÁFOSS



**Flokkurin hjá gamla løgmanni er í einum politiskum tómrúmi. Hóast samfelagið er á veg inn í eina búskaparkreppu, tykist eingin loysn koma frá hornakontórinum úti í Fíggjarmálaráðnum. Ráðaloysið og máttloysið eru so mikið stór, at einasta initiativið frá Javnaðarflokkinum í langa tíð er at prýða seg við fjaðrum frá øðrum. Krúnprinsurin í flokkinum hevur uppskriftina: Nápa politiskar loysnir frá øðrum, pakka tær inn í grønt glansipappír og sel tær av nýggjum. Voila!**

Máttloysið og ráðaloysið í Javnaðarflokkinum tekur ongan enda.

Í hálvt ár hevur flokkurin, ið umsitur fíggjar- og búskaparmál í Landsstýrinum, ikki megnað at víst á loysnir. Samstundis er samfelagið á veg inn í eina alt størri búskaparkreppu.

Loysnir og stórar strukturellar broytingar hava ongantíð verið meira átrokandi enn júst í hesum tíðum. Og ongantíð hevur fíggjar- og búskaparpolitiska ráðaloysið og máttloysið verið størri enn júst nú.

**Góðir møguleikar fyri smidligum loysnum**

Føroyar eru eitt lítið og smidligt samfelag, har veruligur møguleiki er at taka skjótar og smidligar avgerðir. Møguleikarnir hjá eini stjórn at venda eini gongd ella laga samfelagið til broyttar umstøður eru neyvan betri í nøkrum øðrum landi.

Kortini hevur fíggjarmálaráðharrin úr Javnaðarflokkinum higartil einans klárað at borið tvær danskar bankaloysnir í Tingið. Hóast hesar kreppuloysnir hava stóran týdning fyri Føroyar, er enn einki initiativ komið frá fíggjarmálaráðharranum sjálvum.

Ongin vakin og stimbrandi fíggjarpolitikkur, har konstruktivar langtíðarloysnir og skjótar og uppbyggjandi konjunkturloysnir ganga hond í hond.

**Fíggjarlógaruppskotið var makkverk**

Uppskotið um fíggjarlóg, ið varð borið í Tingið í september, var skralltómt. Eingin visjón var í henni. Eingin raðfesting. Og ongin politikkur.

Seinni komu nakrar ússaligar broytingar frá fíggjarmálaráðharranum, men hóast inntøkumetingarnar gjørdust alt dapSrari, og stórt trýst var á politisku skipanina fyri at fáa eina fíggjarlóg við bara nøkulunda dygd í, sást einki initiativ av Argjum.

Uppaftur og uppaftur sóknaðist fíggjarnevndin eftir loysnum úr Landsstýrinum, men úrslitið var hitt sama: har kom einki svar!

Tí noyddist fíggjarnevndin at gera arbeiðið sjálv. Úrslitið var einki at reypa av, men tað kundi neyvan vera frægari. Gamli løgmaðurin, sum skuldi koma við uppskotum til loysnir, sat við einum blonkum og tómum úttrykki í eygunum.

Fíggjarmálaráðharrin hevði slept endanum.

Hetta ber ikki til. Politiska initiativið á búskapar- og fíggjarøkinum má liggja hjá Landsstýrinum og serliga í Fíggjarmálaráðnum.

Kravið má nú vera, at Javnaðarflokkurin tekur sær um reiggj og fer at reka politikk aftur.

**Krúnprinsurin prýðir seg við læntum fjarðum**

Einansta initiativið frá Javnaðarflokkin í langa tíð kemur frá honum, sum flestu í Javnaðarflokkinum peika á sum komandi formann í flokkinum, John Johannesen.

Styrilin í initiativinum frá Krúnprinsinum er tó avmarkaður til, at hann pyntar seg við læntum fjaðrum.

Orkupolitikkurin og játtanin til at bjálva sethús hevur leingi verið eitt aðalmál hjá Sambandsflokkinum. Flokkurin fór til val upp á orkupolitikkin.

Undir samráðingunum um samgongu, kravdi Sambandsflokkurin ein nýggjan orkupolitikk. Byggisamtykt skuldi setast í gildi, bjálving av húsum skuldi gerast lagaligari, og oljan skuldi skiftast út við varandi orkukeldur.

Undir viðgerðini av fíggjarlógini eydnaðist tað Sambandflokkinum, saman við øðrum flokkum, at fáa 15 mió. kr. settar av til at bjálva almennar bygningar við. Harumframt vórðu 5 mió. kr. settar av til orkuverkætlarnir.

Seinni varð eisini arbeitt fyri at fáa gongd á aftur virksemið í grunninum til bjálvingarstuðulslán, so eldri fólk fáa møguleika at bjálva húsini betur.

Á henda hátt gera vit umhvørvinum eina tænastu, samstundis sum gongd fæst á viðlíkahald av húsum. Sostatt stimbrast virksemið innan byggivinnuna.

Einasti flokkur, ið hevur mótarbeitt hesum, er júst Javnaðarflokkurin.

Flokkurin noyddist tó at boyggja seg. Vit vóru fleiri, ið løgdu lógaruppskot fyri Tingið, so virksemið aftur kundi fáast í Bjálvingarstuð ulslánsgrunnin.

Nú arbeiðið er gjørt, síggja vit, hvussu mótstøðuflokkurin leggur sína køldu og slavnu hond á verkið. Nú kallar Javnaðarflokkurin tiltakið ein "grønan vakstrarpakka".

Hetta er ikki bara óseriøst. Hetta er eisini at pynta seg við fjaðrum frá øðrum. Endamálið er uttan iva at fjala út yvir, at Javnaðarflokkurin er politiskt nektaður.

**Má taka seg saman**

Búskaparstøðan er hættislig og versnar dag undan degi. Loysnir mugu finnast og avgerðir takast. Landið hevur ikki brúk fyri politiskum ráðaloysi.

Tí er álvarsamt, at Javnaðarflokkurin vísir júst slíkt ráðaloysi.

Vit kunnu illa liva við, at flokkurin á týdningarmesta postinum í løtuni, fíggjar- og búskaparmálum, onga handlikraft hevur.

Tí henda inniliga áheitan á Javnaðarflokkin um, at taka seg saman og byrja at finna loysnir.

Uppskriftin hjá Krúnprinsurin – at nápa politiskar loysnir frá øðrum, pakka tær inn í grønt glansipappír og selja tær av nýggjum – er ongin kunstur.